# Málsviðgeri í skúlamálum



Av tí at ein av okkara málsviðgerum er farin í annað spennandi starv, verður søkt eftir dugnaligum málsviðgera at umsita m.a. skúlamál.

Tórshavnar kommuna er virkin og fjølbroytt á skúlaøkinum. Vit sóknast eftir einum fólki, sum hevur hug og áræði at ganga á odda at tryggja, at námsfrøðiliga innihaldið í kommunalu skúlabygningunum er á høgum stigi. Kommunan arbeiðir í løtuni við eini heildarætlan fyri skúlaøkið, sum fevnir um fólkaskúlan, musikkskúlan og kvøldskúlan. Partur av arbeiðsuppgávuni verður at samskipa hetta arbeiðið og tryggja gott arbeiðslag við fakfólk og brúkarar.

## Mentamáladeildin

er deild undir trivnaðarfyrisitingini. Deildin umsitur tann partin av føroyska skúlaøkinum, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing o.a. er skipaður hjá kommununum. Til deildina hoyra: Fólkaskúlarnir, musikkskúlin, kvøldskúlin, býarbókasavnið, býarsavnið, svimjihøllin og stadionøkið.

## Kommunan bjóðar

eitt áhugavert starv við fjølbroyttum uppgávum, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning.

## Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:

- at luttaka í og standa fyri verkætlanum á skúlaøkinum og gera útgreinandi arbeiði í hesum sambandi
- at samskifta við skúlar, stovnar, feløg og einstaklingar, sum virka á mentamálaøkinum
- at vegleiða og ráðgeva leiðslu og politiska myndugleikanum í spurningum á skúla- og mentamálaøkinum

## Førleikakrøv

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og kunnleika til økið.

Umsøkjari skal duga føroyskt og enskt og hava kunnleika til teldu á brúkarastigi.

Kunnleiki til fyrisitingarrætt er ein fyrimunur, men eingin treyt, tí at kommunan skipar støðugt fyri skeiðum fyri starvsfólki á hesum øki.

## Persónligir eginleikar

Umráðandi er, at umsøkjarin er áhugaður í mentamálaøkinum, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis. Viðkomandi skal duga at leggja til rættis og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

## Setanarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

## Meira fæst at vita

um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, telefon 30 20 10.

## Umsóknir

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mai 2008.

**Tórshavnar kommuna**

**Keyp eina New Holland Heavy Line áðrenn 30.05-2008**
**og fá ein túr til Ferrari verksmiðjuna í Italia**

**www.okheilsola.com**
430 Hvalvík · tel 42 23 94 · okhammer@post.olivant.fo



NEW HOLLAND CONSTRUCTION
BUILT AROUND YOU

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR